

Mynd: BW LPG

# Byggja gasstangaskip fyri átta milliardir krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

12.04.2015 - 08:51

Oljan.fo

BW LPG hevur gjørt avtalu við Daewoo-skipasmiðjuna, DSME, um at byggja fýra stór gasstangaskip.

Skipini kosta um tvær milliardir hvørt tá tey eru klár at lata eigarunum seinna hálvár í 2016.

Sjálvt um vit fáa nógv fyri flutningin í dag, og at hesir prísirnir ikki fara at halda, so rokna vit við vøkstri komandi árini. Hetta ger at vit ynskja at betra um okkara flota av skipum, sigur aðalstjórin í BW LPG, Nicholas Gleeson, í eini viðmerking, sambært E24.